
*Elin Maria Thomsen*


*Jóan Pauli Thomsen*


*Karl Thomsen, sonur teirra fórst við grindabátinum*


*Henrik Dahl fórst eisini við grindabátinum í 1939*

henda leygardag seinnapart. Tær høvdu avrátt við pápan um at koma ímóti teimum. Tá hann møtti teimum á Skálaskarði, helt hann veðrið vera so vánaligt, at hann mælti til, at tey fóru oman aftur til Norðskála. Ein triðja systir, Sigga, var gift á Oyri við Jákupi Strømsten. Onnur systirin mutaði ímóti, tí henni longdist eftir móður síni, og tey hildu tí leiðina fram. Veðrið versnaði skjótt, og tey gjørdu tí av at royna at sleppa oman í Funningsbotn. Og oman fyri garðarnar í Funningsbotni vórðu tey funnin morgunin eftir. Pápin, Samuel Sivertsen, Sámal hjá Siggu, og onnur dóttirin, Petrina, vóru deyð, men Anna Maria, sum hevði sitið millum tey bæði aftur undir einum steini, har tey høvdu leitað sær skjól, var framvegis á lívið, og hon kom fyri seg aftur. Hon giftist við Anton á Skipinum við Gjógv, ið var ein av teimum, sum høvdu leitað.

Petrina hevði tænt hjá Tummasi Egholm, bónda í Hvalvík, í 6½ ár. Hon var 25 ára gomul. Bæði frá Norðskála og úr Funningi høvdu menn verið og leitað leygarkvøldið, men veðrið var so ringt, at teir máttu venda aftur. Funningsmenn vóru á fjalli henda dagin, og Sámal fór beint av rættini og ímóti teimum, so hann var móður og tí ikki so væl fyri henda feigdardagin.

--

Tveir hvalbingar vóru, tó uttan at vita av hvørjum øðrum, á veg av Tvøroyri til Hvalbiar, tá ódnarveðrið brast á. Annar, Thomas Pauli Thomsen, Palli á Brekkuni, úr Nesi, bar ikki boð í bý, men hin, Jóan Jacob Strøm við Krógv, legðist at ríva ein varða niður og at byggja hann uppaftur fyri ikki at stirðna, og hann varð funnin í øllum góðum. (Johannes Andreas Næs: Eingin veit frá einum at siga. Birting 1991)

--

Motorbáturin Sjóløvan við Ísaki Isaksen úr Vestmanna umborð lá á Sandavági. Báturin rak til havs og varð ikki funnin fyrr enn eina viku seinni. Tá var Ísakur deyður. ( Niels Nattestad: Feigdarferðin. Birting 1991)

### Tá hitin mátti sparast.

Pápi var burtur, tá eg var smádrongur, og altíð mátti sparast brenni. Vit høvdu fýrstað og ein bíleggarovn inn í kamarið, helst var ein síða av honum inn í stovuna. Mamma plagdi at kóka okkurt til náttturða, antin tað var súpan ella kanska fisk. So plagdu hon at koyra glóðirnar í bíleggaraovnin og so onkra torvu aftrat. Nú gjørdist hiti í kamarinum, og her vóru øll systkini.

### Jólatræ

Tað var nær uppundir jól, og tað var sama heystið, tá Hans beiggi fer at gera okkum eitt jólatræ. Hann var so hegnigur og gjørdist smiður seinni. Hann gjørdi fyrst stammuna, og so gjørdi hann armar, sum skuldu fyristilla greinar. So heintaðu vit lyng og vavdu tvørtur um greinarnar. Undir fyrra heimsbardaga kom so nógv voks rekandi, og pápi man hava fingið onkustaðni frá. Hans stoypti jólaljós burturúr hesum voksinum. Hann hevði gjørt sær formar til endamálið, men eg minnist ikki, hvussu jólaljósini vórðu heft í greinarnar. Tað er møguligt, at stakar hava verið at fáa. Eg minnist einki annað jólatræ at hava verið í Tarti. Men tá eg var smádrongur var eitt jólatræ í skúlanum, og tað var Anna lærarinnan, sum kom við tí. Tað hevur helst verið undan fyrra heimsbardaga.

### Um Jóan Paula

Jóan Pauli Thomsen var ein av handilsmonnum í Oyndarfirði, sum eg skal greiða eitt sindur meira frá.

Jóan Pauli kom fyrst í 1890-unum úr Vestmanna í Hálvmørkshandilin. Hann var føddur í 1867 og var ikki myndigur, tá hann tók við handlinum, og tí stóð systir hansara Thomasia fyri honum fyrstu tíðina. Jóan Pauli giftist í 1891 við ta javngomlu Ellen Mariu Jacobsen úr Vestmanna. Tey fingu ein son, Karl, í 1892, men Elin doyði í barsilssong við næsta barninum.

Nøkur ár eftir, at Elin var deyð, giftist Jóan Pauli upp aftur við systir fyrru konuna, Thomina Maria, men tey fingu eingi børn.

Hálvmørkshandilin seldi alt vanlig til húsarhaldið, og afturat hesum bakaði Thomina bæði rugbreyð, byggbreyð og vinarbreyð. Hon kókaði eisini bróstsukur at selja. Tað var ikki altíð farandi um ánna um veturin, og tí leigaði Jóan Pauli eitt kamar í Billustovu til handil.

Tað sum loysti seg best mundi vera fiskaarbeiðið. Hann keypti fisk bæði frá bátum í Oyndarfirði og aðrastaðni og lat fólkið í bygdini vaska og turka hann. Eftir at Kjølbro byrjaði sítt virksemi fór hann at samstarva við Jóan Paula, sum fekk 12% fyri at arbeiða fiskin. Av hesum skuldi hann tó gjalda útreiðslur.

Jóan Pauli dugdi væl at skyna á veðri og tók fyrilit fyri umstøðunum, so fiskurin loyptist ongantíð. Hann lat tey ikki breiða á svartari hellu í skarpari sól. Hann brúkti barometrið og roðan á luftini at meta seg eftir og plagdi at siga, at helt hann sær á fløðandi sjógvi, so var turt í fjarandi sjógvi. Vit plagdu at spyrja Jóan Paula um líkindi, áðrenn vit fóru til útróðrar, og tað passaði altíð.

Jóan Pauli sat í kommununi langt áramál og var eisini formaður. Hann fekk ta sorg at missa sín einasta son við grindabátinum, sum vit koma til seinni.

Jóan Pauli tók sær eisini av tí skrivliga við sjúkrakassanum, og her var eisini væl frágingið.

Jóan Pauli man hava skotið harur í Vestmanna, áðrenn hann kom til Oyndarfjarðar. Hann dugdi so væl at bera seg at. Ein gamal maður, Jógvan Hammer, fortaldi fyri mær, at einaferð, tá hann var ungur, at nú fer Jóan Pauli fram á Heltnina at skjóta harur. Hann bað Jógvan koma við sær til at bera. Teir fara fram í Líðina. Tað er oman fyri har, tað er dyrkað upp, og har situr ein hara á barajól. Her var ikki so lætt at koma, tí her var einki grót. Men so sigur Jóan Pauli við hendan her: "Nú skal tú standa stillur og láta við hondunum. Haran er so mikið býtt, tá hon sær slíkt, so blívur hon bara við at hyggja". So fór hann lúrandi og kom haruni í skotmál, og hon lá.

Tá Jóan Pauli kom til Oyndarfjarðar sum ungur hevði hann kaninir við eisini, men hetta er alt fyri mína tíð.


*Thomasia og Sofus Rinkustein. Sofus fórst við grindabátinum í 1939*

Tann, sum arbeiddi fiskin hjá Jóan Paula, kallaðist Per Joensen, ættaður av Brúnni í Funningi. Hann hevði við fiskin at gera, tá teir avreiddu har í Billustovufjósinum, sum stóð niðanfyri kirkjuna.

Har hekk ein fiskavekt. Per flakti, saltaði og reiv um. Hann var eitt slag av uttanbudamanni hjá Jóan Paula Thomsen. Hann plagdi at velta og fletta fyri hann. Hann plagdi eisini at leingja húðaskógvar, og tað dugdi hann so sera væl. Tá teir høvdu skorið skógvar burtur úr húðini, teir visti altíð, hvar á húðini tað besta skøðið var, so mundi tann tynra húðin verða brúkt til húðaskógvar hjá børnum.

Tann maðurin plagdi at ríva sundmagar, men tað hevði hann sjálvsagt privat. Per var so snøggur maður, hann var eisini tuflusmiður og smíðaði tuflur fyri nógv fólk í Oyndarfirði og legði eisini leður uppundir tuflur. Harald í Hálvmørk smíðaði eisini tuflur.

Sosialurin